

www.oljan.fo

**Jan Müller** 29 - 11 - 2011

# Íslendingar góðar vónir

Í Íslandi eru fólk fegin um ta seinastu norsku frágreiðingina, sum gevur ábendingar um, at olja og gass kunnu vera at finna undir havbotninum á Drekaleiðini, sum er í tí íslendska partinum av Jan Mayen-rygginum. Í veruleikanum eru tað tvinnar orsøkir til frøina í Íslandi, tí alt bendir eisini á, at útgerðardepilin í sambandi við eina komandi oljuvinnu við Jan Mayen verður í Íslandi. Útlitini á Drekaleiðini og spurningurin um útgerðardepilin vóru til umrøðu í Altinginum nú um dagarnar í sambandi við ein fyrispurning. Undir orðaskiftinum upplýsti Katrín Júlíusdóttir, ídnaðarmálaráðharri, at farið er undir fyrireikingar til at gera ein útgerðardepil til olju og gass í Gunnólfsvík, sum er har eysturio á Norðurlandinum. Ráðharrin nam eisini við ta seinastu frágreiðingina hjá norðmonnum um Jan Mayen-ryggin. -Mátingarnar í summar siga mær, at eg kann loyva mær at vera bjartskygd í sambandi við ta útbjóðingina, sum liggur frammi nú, og sum støða skal takast til í apríl næsta ár. Sjálvandi ber ikki til at lova nakað, men eg loyvi mær at siga, at kanningarúrslitið í summar gevur góðar vónir, segði Katrín Júlíusdóttir, ídnaðarmálaráðharri, í Altinginum.